UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

Kunningarskriv til
allar skúlaleiðarar í fólkaskúlanum

Dagfesting: **12. mars 2020**
Tygara ref.**:**
Máltal.**: 19/00277-14**

Tiltøk vegna corona smittuvanda

Boðað verður hervið frá, at avgjørt er, at allir næmingar í fólkaskúlanum skulu vera heima við hús skjótast til ber og í seinasta lagi frá mánadegnum 16. mars 2020.

Hetta merkir, at allir fólkaskúlar skulu frá í seinasta lagi frá mánadegnum 16. mars og fyribils í 2 vikur avmarka skúlagongdina sum allar mest. Foreldrini skulu kunnast um, at børnini skulu vera heima og annars fylgja teimum tilráðingum, sum koma frá heilsumyndugleikunum so hvørt.

Í hesi kreppustøðu, ið allur heimurin er komin í, verður neyðugt, at ávís starvsøki halda fram ótarnað. Her er talan um m.a. heilsuverkið, eldraøkið, løgregluna, tilbúgvingina og innan ávísar vinnur. Hesi starvsfólk mugu røkja sínar arbeiðsligu skyldur, og tað kann geva avbjóðingar viðvíkjandi ansing.

Skúlarnir og frítíðarskúlarnir mugu tí hava opið í neyðugum vavi fyri børn, sum ganga í forskúla og 1., 2. og 3. flokki, har eingin onnur ansing er møgulig. Henda serskipan er bara galdandi hjá teimum børnum, hvørs foreldur starvast á serliga avgerandi økjum, og sum ongan møguleika hava fyri ansing annars.

Hesi foreldur mugu venda sær til skúlaleiðsluna við grundgevingum fyri, hví tørvur er á hesum tilboði. Skúlans skylda í hesum sambandi er frá á morgni sum vant og til middags, tá ið frítíðarskúlin tekur yvir.

Tilmælið er, at ikki fleiri enn 10 børn og vaksin eru saman í hvørjum høli. Í hesum sambandi verður heitt á skúlaleiðslurnar at samskipa tilgongdir saman við skúlaheilsufrøðingunum.

Skúlaleiðslan leiðir og skipar arbeiðsbýtið millum starvsfólk skúlans í hesum sambandi. Vanliga skúlaskipanin er niðurløgd, og tí er talan um serstøðu við avmarkaðum virksemi. Skúlaleiðslurnar verða vinarliga bidnar um at seta fyriskipanir í verk, so undirvísingin kann halda fram so væl sum gjørligt, hóast næmingarnir eru heima. Hetta er serliga galdandi fyri hádeildina og serliga hjá teimum, sum skulu til prótvøku.

Fyri at hetta skal bera til, skulu skúlarnir hava neyðuga tilbúgving til reiðar, so lærarar, sum hava tørv á tí, kunnu brúka og fáa vegleiðing um nýtslu av tøkniligum hentleikum. Víst verður til Nám viðvíkjandi tøkniligum spurningum – Tóri Slættalíð tlf. 555180.

Lærarar og onnur starvsfólk skulu eisini fáa høvi til at arbeiða í skúlunum, um tað gerst neyðugt. Í hesum sambandi eiga skúlarnir at taka fyrivarni fyri, at starvsfólk fylgja ráðum frá heilsumyndugleikunum.

Tinghúsvegur 5-7 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
☏ +298 30 65 00 • ✉ ummr@ummr.fo • www.ummr.fo

Skúlarnir verða vinarliga bidnir um at skipa so fyri, at foreldur og næmingar eru kunnað um støðuna og at seta í verk beinleiðis telefonlinju at svara spurningum frá starvsfólkum, foreldrum og avvarðandi at næmingum. Heitt verður á skúlaleiðslurnar um at samskipa ráðgevingina saman við skúlaheilsufrøðingunum.

Starvsfólk varðveita sína løn og eiga at gera tað, umstøðurnar loyva, so teirra uppgávur verða røktar so væl sum til ber.

Talan er um eina undantaksstøðu, sum fyribils er galdandi í 2 vikur. Tamarhald er enn á støðuni í Føroyum, men av tí at støðan í londunum kring okkum er hættislig, verða hesi tiltøk sett í verk fyri at minka um vandan fyri smittuspjaðing í Føroyum. Hvør einstakur eigur at taka ábyrgd fyri sjálvum sær og sínum nærmastu.

Føroya Lærarafelag er kunnað um hetta skriv.

Undirvísingarstýrið hevur skipað fyri beinleiðis telefonlinju at svara spurningum frá leiðslum og umsiting skúlanna. Ringjast kann á telefon:

555048 Eyðdis Eidesgaard
555029 Magnus Tausen

Vinarliga

Uttanríkis- og mentamálaráðið

Jenis av Rana
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen
aðalstjóri